Tórshavn, hin 24. juni 2010
Málnr.: 403-202000405

# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Útgáva 3
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## grill- og pylsuvognar

**Endamál:**
Grilla, steikja, friturusteikja og servera pylsur, búffar, kips og annan grillmat. Møgulig tilvirkan av tilhoyrandi grønmeti.

**Hølir:**
- Vørumóttøka
- Goymsla til turrvørur, køli- og frystivørur
- Rúm/øki til matgerð
- Útsølurúm/øki við diski ella lúku
- Uppvaskirúm/øki
- Vesi og skiftirúm til starvsfólk
- Matstað til starvsfólk
- Rúm ella stað til reingerðaramboð og reingerðarevni við skolivaski
- Rúm ella bingju til burturkast

**Innrætting:**
Støddin á hølunum skal svara til vøruútboðið (slag og nøgd), og hølini skulu plaserast hóskandi hvørt í mun til annað.

**Vegleiðing til innrætting:**
- Vørumóttøka við plássi til útpakking og goymslu av returpakkitilfari.
- Goymsla til turrvørur, eingangs borðbúnað, pakkitilfar, køli- og frystiskipanir, amboð og annað.
- Rúm/øki til matgerð skal vera nóg stórt og soleiðis innrættað, at pláss er fyri at virka tey ymisku matsløgini, uttan at vandi er fyri kross dálkan. Matgerð og útsøla kann fara fram í sama rúmi/øki.
- Tað skal ikki vera atgongd til køk ella viðgerarrúm beinleiðis útifrá, ella úr øðrum rúmum, sum kunnu elva til dálkan, so sum goymslur, vørumóttøkur o.l. Uppvaskirúm/-stað skal vera atskilt frá matframleiðslu.
- Vesi við forrúmi, hondvask skal vera á vesinum
- Skiftirúm kann verða í forrúminum til vesi, um umstøður eru til tess. Plaseringin skal verða soleiðis, at arbeiðsfólk ikki fer ígjøgnum matframleiðslurúm ella onnur "rein" í egnum klæðum/yvirklæðum
- Um borðstova er til viðskiftafólk, skal hendan verða soleiðis plasera, at viðskiftafólk ikki á nakran hátt koma í samband við matframleiðslu ella onnur rúm sum hava samband við matframleiðsluna
- Vesir til viðskiftafólk skal verða á staðnum, um borðstova er við sitiplássi til meiri enn 12 fólk samstundis
- Eitt ávíst stað skal vera til returvørur, so hesar ikki koma í samband við reinar vørur.
- Rúm, við skolivaski, ella hóskandi stað, atskilt frá matvørum, skal vera til reingerðaramboð og reingerðarevni.

**Útbúnaður:**
- Hondvask við heitum og køldum vatni.
- Flótandi sápa og eingangshandklæði við øll hondvøsk.
- Neyðugar køli- og frystiskipanir við sjónligum hitamátara.
- Oskápa við fitifiltrum og nóg høgum luftskifti omanfyri ovnar, komfýrar og onnur hitatól til matgerð.
- Neyðugt borðpláss, hillar, skáp, ovnar, hitaplátur og onnur hitatól til viðgerð av mati.
- Uppvaskieindin skal vera minst eitt vask við heitum og køldum vatni, umframt uppvaskimaskina, sum vaskar við 80°C. Í smærri grill- og pylsuvognum kann góðtakast, at eingin uppvaskimaskina er, men tá skal vera dupultvask við heitum og køldum vatni.
- Nóg mikið av pannum, grýtum, tongum, sleivum og øðrum smálutum til viðgerð av mati.
- Nóg mikið av ruskíløtum.
- Allur leysur útbúnaður, amboð o.a. skal standa upp frá gólvinum á hóskandi hillum e.l.
- Bjálvast skal rundan um ljós í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.
- Toygardinur, forhang o.l. skulu ikki vera í rúmum, har viðgerð av mati fer fram.

**Tilfar:**
- Veggir, gólv, loft, hurðar og vindeygakarmar skulu vera úr hørðum, sløttum, ljósum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.
- Allur útbúnaður skal vera úr hørðum og sløttum tilfari, sum ikki drekkur vatn í seg.

**Burturkast skipan:**
- Burturkast skal beinast út úr framleiðsluhølunum minst eina ferð dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommunalu skipanini (KOB/IRF).
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkastið.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast / vaskast.

**Reingerð:**
- Allur útbúnaður og amboð skulu gerast rein eftir tørvi, tó minst eina ferð hvønn arbeiðsdag.
- Skrivlig reingerðarætlan skal vera og henda skal fylgjast.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð, og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Persónligt reinføri:**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað:**
Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at liðugvøran ikki verður dálkað av rávøruni ella nærumhvørvinum.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.